F L R

Føroyskt Lógar Rit – Vol. 1, No. 2, Jul 2001

Faroese Law Review – Vol. 1, No. 2, Jul 2001

Sjálvræði og Sjómark

F L R

Føroyskt Lógar Rit – Vol. 1, No. 2, Jul 2001
Faroese Law Review – Vol. 1, No. 2, Jul 2001

Sjálvræði og Sjómark

Føroyskt Lógar Rit (Faroese Law Review) vol. 1 no. 2 – 2001.

Vanligar ávísingar eru loyvdar. Vit mæla til henda hátt: 1 FLR (2001) 117

Tilskrift: c/o Birta Biskopstø. J. Paturssonargøta 23, kj. 100 Tórshavn.
Teldupostur: tsbirbi@tollskatt.fo

ISSN 1601-0809

Prent: Estra Prent

Føroyskt Lógar Rit (Faroese Law Review) vol. 1 no. 1 – 2001.

Usual citations are allowed. We recommend this mode: 1 FLR (2001) 117

Address c/o Birta Biskopstø. J. Paturssonargøta 23, kj. FO-100 Tórshavn. Faroe Islands. Email: tsbirbi@tollskatt.fo

ISSN 1601-0809

Printing: Estra Prent

Innihald / Content

Kári á Rógvi, ritstjóri

Og læra teir siðir og lógir

Sambært brestiskvæði ætlar Gøtutróndur fyrst at drepa høvdingasynirnar, Sigmund og Tórir. Men síðani gongur hann undir at ala teir upp 'og læra teir siðir og lógir'.

At læra føroyskar siðir og lógir, at ráða og greina reglur og ráð, ið einans galda í Føroyum ber ikki til í dag á nakran skipaðan hátt. Í øllum førum neyvan á sama støði sum í Gøtu á sinni, har vit kunnu ætla at tann mæti høvdingin á miðvísan hátt kundi greiða og greina føroyska lóg.

Í grannalandinum fyri vestan var siður, og kann vera enn, at fríbóndasynir dugdu brot úr lógbókunum uttanat og skuldu siga tey fram, áðrenn teir sluppu til borðs. Lesa vit íslendsku søgurnar, frætta vit um lógkunnleika á høgum støði. Vit kunnu ætla, at í Gøtu og í Skúvoy vóru høvdingarnir lógkønir, og teir bæði dugdu og noyddist at læra teir yngru siðir og lógir.

Meðan fortreytin fyri fólkinum, tjóðini eru felags kenslur og fatan, so man fortreytin fyri landinum, politisku eindini vera stjórnarskipan og lóg.

Hvat tilknýti hetta landið og hetta fólkið skuldu hava til onnur lond var ein stríðsspurningur, tá Sigmundur lærdi lóg hjá Tróndi. Og um sama spurning er mikið stríð enn.

Men tað, sum tóktist sjálvsagt hjá bæði samveldissinnaða Sigmundi og fullveldishugaða Tróndi var, at føroyingar høvdu egnar siðir og lógir. Rættir menn kendu hesar siðir og lógir. Teir frægastu sótu á tingi. Antin og rættaðu lóg ella lýddu á rættarmál hjá øðrum. Men bæði lógsøgusiðurin á tingi og lóglæra hjá høvdingunum hava tryggjað tað neyðugu greiningina og fatanina av dómunum.

At Gøtutróndur ferðaðist á ting í øðrum londum og tók orðið har, sigur okkum, at føroyingar helst høvdu eina fatan av løgdømum. Føroyar vóru land fyri seg, men føroyingar tóku við lógum og dómum úr øðrum londum. At vísa til útlendskan rætt er ikki sjálvsamt í tingbókunum úr miðøldini.

At Føroyar altíð hava verið og eru eitt løgdømi fyri seg merkir, at tørvurin er stórur á kunnleika til lóg, bæði samtykta lóg og lóg í siðvenju. Lógdátugrunnurin eins og dómsavn og avgerðasøvn er fortreytin fyri kunnleika til lóg. Lógarritið og ein lógskúli fortreytin fyri fatan og greiðnan av lóg.

Tíbetur er lógarritið nú skipað í fasta legu. Ætlan okkara er, at nýggjur blaðstjóri tekur við á hvørjum ári saman við eini blaðstjórn, har summi nýggj taka við, onnur roynd halda fram. Við lógarritinum fer at bera til at læra Føroya siðir og lógir aftur.

Føroyar hava í túsund ár verið egið rættarøkið men undir ávirkan uttaneftir. Føroysk lóg og útlendsk sleingjast hvør um aðra og ivi kann ofta vera um, hvør lóg er lóg á landi.

Fyrra greinin hesuferð er um sjálvstøðu og fullveldi. Sum framhald av greinunum í fyrsta ritinum viðger Bárður Larsen hesi bæði hugtøkini. Nú geva fólk sær ov lítið far um slík hugtøk, men nýta tey heldur at brigsla við. Tá er tað betri at skilja uppruna og týdning.

Næsta ritið fer væntandi at snúgva seg um olju og rætt. Vit royndarbora í tað temaið við eini grein hjá Ullu Svarrer Wang um Rockall-økið. Nú oljuleiting ber til langt frá landi skotin, kunnu vit spyrja hvar markið gongur millum landa á slíkum fjarðum leiðum.

Hesi bæði fyrstu ritini og tey, ið leggjast afturat, fara vónandi at vera støði undir lógskúla í Føroyum. Okkum tørvar ikki alla útbúgvingina, sjálvur Sigmundur lærdi eisini í øðrum landi. Uttan heldur tørvar okkum at teir gomlu og vísu her á landi undirvísa á einum meistaraskeiði. Hetta skeiðið kunnu so lærd og roynd fólk taka eftir einum ári ella tveimum.

Greinarnar í hesi riti og hinum verða tí vónandi grundarlagið undir fakum á einum lógskúla, har vit aftur kunnu læra siðir og lógir.

Kári á Rógvi, editor-in-chief

And teach them practice and law

It is told in Faroese songs that the chieftain Tróndur of Gøta intended to kill the sons of his two main rivals after their fathers had been slain in battle. When faced with strong opposition, the chieftain is said to have brought them home to raise 'and teach them practice and laws'.

To study Faroese legal practice and laws, to read law only applicable in the Faroes, in systematic way is not possible in our time. In any case not on the same level as in Gøta in ancient times, where the headman, probably, in a focused and determined way could teach and analyse law.

In our neighbour country to the west it was customary for young freeholders' sons to be taught to recite the old law books at the table before eating. Reading the Icelandic sagas gives the distinct impression of legal knowledge of a high standard. In all likelihood, the Faroese strongmen were just as knowledgeable and both could and had to teach the youngsters practice and law.

Just as a common sense of identity is the prerequisite for the sense of nationhood, the legal entity is dependant on constitution and law. What affiliation the Faroese as a nation and as a legal entity should have to other countries, was a contested question in ancient times and is still so today.

But, what united the battling chiefs of old, unionists as well as separatists, appeared to be an understanding that the Faroese have their own practices and laws. The best men of the land spent time sitting on the ting – partly assemblies, partly courts of law. Reading the statutes aloud and teaching law

at the chieftain's residence ensured both knowledge and understanding of the law as evident in practice.

As the Faroes always have and still do constitute a distinct jurisdiction, the need for knowledge and understanding of both practice and law cannot be underestimated. The need for knowledge will be met by the recently established Statute Database, available on the internet, and by the planned databases on judgements, administrative decisions and tribunal cases. The need for analysis and understanding will have to be met by scholarly writing and a law school of some sort.

Luckily, the Faroese law review is now well established, providing a forum for legal debate and analysis. What we now need is a Faroese law school. Plans have been hatchet to establish a Master degree in Faroese law. As a postgraduate program, Faroese law can be taught by practicing lawyers and visiting scholar alike without numerous full-time faculty.

The first article, by Bárður Larsen, in this issue is concerned with the concepts of independence and sovereignty. These are very fundamental concepts that have been misused somewhat in the political debate. Defining the meaning and origin of such concepts is vital for the academic debate as well as the political.

The second article, by Ulla Svarrer Wang, deals with delimitation of international borders on the Rockall Plateau. With the improvements of recent years in drilling techniques, hitherto undivided underground areas are now showing potential for exploitation. Our next issue will presumably be dedicated to oil and gas related issues. This interesting piece on the future prospects of Faroese hydrocarbon pursuits will be initial drilling exercise into the oil and gas issues.

Hopefully, the first two law reviews and those to come will provide the basis for at law school in the Faroes. We do not need the undergraduate teaching, even our chiefs of old acquired knowledge abroad. Rather, the old and wise in our land should teach their knowledge to others on a postgraduate basis.

The Faroese law review will, thus, contain the seeds for the Faroese to be taught the practice and law of land again.

Aðalfundur og nýggj ritstjórn

Árligi aðalfundurin hjá Føroyskum Lógar Riti var hildin 20 juli. Fundurin valdi nýggja ritstjórn eftir lóg felagsins.

Brot úr lógini:

§4. Ritstjórnin verður vald á hvørjum ári. Allir limir í Føroyskum Jura Lesandi (FJL), tey ið lesa nóg lógartengd fak og øll yngri lógkøn kunnu møta á fundi at velja ritsjtórnina. Fráfarandi Ritstjórin skipar fyri valinum eftir vanligari mannagongd.

Hesir limir skulu veljast:

A. Ritstjórin
B. Tvey lesandi
C. Ein ungur lógkønur
D. Ein ungur stjórnarkønur

Hesir limir eru sjálvvaldir:

E. Forsetin í FJL
F. Eitt umboð fyri løgfrøði ella samfelagsdeildina á fróðskaparsetrinum.

Nýggja ritstjórnin tekur við ábyrgd frá riti 3 í fyrsta árgangi (vol. 1 no. 3).

Í ritstjórnini eru nú:

A. Birta Biskopstø
B. Bárður Larsen
B. Herborg Sloan
C. Kári á Rógvi
D. Sigmundur Isfeld
E. Súsanna Leo
F. Søgu og Samfelagsdeildin hevur ikki valt sítt umboð enn.

Bárður Larsen

Fullveldi sum ríkisrættarlig sjálvstøða

English summary
Title: Sovereignty as Constitutional Independence. The article is an effort to show how the term sovereignty is used to describe different political and legal phenomena. The author stresses the importance of differentiating between the concept of sovereignty and the concept of independence; those are not congruent terms, and much confusion arises from the mixing-up of the two. The author explains that sovereignty is a qualitative term, because a given political entity either is or is not sovereign, while independence is a quantitative term, as a given political entity may be more or less independent legally, politically, economically and so forth. He illustrates by concrete empirical examples how the term sovereignty, when used incorrectly, can be a useful tool in the hands of politicians carrying certain hidden agendas. The author points out that one meaning of the term sovereignty is more fundamental than others; i.e. sovereignty as constitutional independence. In conclusion the author repudiates, what he describes as "the fashionable notion" that sovereignty as a property of states

should have lost its importance as a cornerstone of the international community.

Føroyskt úrtak
Í greinini verður gjørd ein roynd at vísa á, hvussu orðið fullveldi verður nýtt um ymisk politisk og rættarlig fyribrigdi. Høvundin metir tað vera av stórum týdningi at halda hugtøkini fullveldi og sjálvstøðu hvør sær, skulu tey verða skilt rætt. Við ítøkiligum dømi verður víst á, at verður farið lætt um ymsar merkingar, kann fullveldi vera hent amboð í hondunum á fólki við onkrari ávísari politiskari dagsskrá. Gjøgnum greinina gongur eisini aftur, at ein týdningur av fullveldinum er meira grundleggjandi enn aðrir; tað er fullveldi, ið er ein fylgja av ríkisrættarligari sjálvstøðu. At enda verður nomið við mótan at siga fullveldi hava mist sín týdning sum grundarsteinur í altjóða samfelagnum.

Inngangur *

Í hesi grein skulu nakrar, eftir míni meining, serliga týdningarmiklar síður av fullveldishugtakinum verða lýstar. Ein orsøk til at eg havi mett hetta evni at vera áhugavert er, at tað er alt ov sjáldan, at ymsu týdningarnir verða útgreinaðir av einum so týdningarmiklum politiskum og løgfrøðiligum hugtaki sum fullveldi. Tá talan er um eitt ógvuliga víðfevnt evni, er øll orsøk at vera lítilætin. Summi evni, ið her verða viðgjørd, eru soleiðis so breið og so nógv viðgjørd í bókmentum gjøgnum tíðina, at ein bert fær komið stutt inn á tey á ein hátt, ið neyvan kann vera nøktandi. Eisini er talan um eitt so umstrítt evni, at ikki slepst undan, at onnur vilja halda heilt øðrvísi um nógv, ið her verður borið fram. Talan er serliga um eina løgfrøðiliga lýsing av fullveldishugtakinum, sum vísir á ymsar týdningar, men tó hevur fullveldi í merkingini ríkisrættarlig sjálvstøða sum miðdepil. Hartil verður eisini stutt komið inn á, hvussu fullveldishugtakið verður nýtt politiskt. At enda verður nomið við fyribrigdið at siga fullveldi hava mist sína støðu sum grundarsteinur í altjóðarætti og altjóða politikki.

Ríkis - og fullveldishugtakið

Nógv hevur verið skrivað um fullveldishugtakið gjøgnum tíðina og nógvar ósemjur hava verið. Men eitt tykist at standa rímiliga fast. Tað er, at fullveldi er nakað, ið fylgir av tí at vera ríki (statur) og at bert ríki kunnu

* Eg takki Sigmundi Isfeld fyri at hava skrivað enskan samandrátt og fyri góð ráð um ábøtur bæði til mál og innihald.

hava fullveldi.[1] Fullveldishugtakið og ríkishugtakið eru soleiðis óloysiliga samantvinnað, og tað ber ikki til at vita, hvat fullveldi er, uttan eisini at vita, hvat eitt ríki er. Tí verða fullveldishugtakið og ríkishugtakið í stóran mun viðgjørd undir einum í hesi grein.

Ríkishugtakið

Ofta verður tosað um ríki og fullveldi í altjóðarættarligum høpi. Hetta hevur, sum komið verður inn á seinni, sína partvísa orsøk í, at ávísir ástøðingar hava hildið, at tað er í altjóðarætti, at ríkini eru skapað, at tað er her, keldan til teirra tilveru liggur. Hetta er neyvan rætt. Altjóðarættur er ein rættarskipan, ið er uppstaðin sum svar uppá ein tørv fyri samveru og samstarvi millum ríki, sum longu vóru har frammanundan.[2] Støðan er sostatt tann øvugta. Tað er í ríkinum (ríkisrættinum) og fullveldinum, at altjóðarættur hevur sína keldu. Sum komið skal vera til seinni, er tað av stórum týdningi fyri at skilja munin millum fullveldi og sjálvstøðu *(independence)*, at ein ger sær greitt, at fullveldið hevur sína keldu í ríkinum (ríkisrættinum).

Hóast ríkishugtakið ikki kemur frá altjóðarætti, so hevur tað, sum ábent omanfyri, verið gjørd ein roynd so at siga at flyta tað yvir í altjóðarætt og greina tað har. Tí finna vit eisini kendastu lýsingina av ríkishugtakinum í einum altjóðarættarligum sáttmála, nevniliga Montevideosáttmálanum frá 1933 um rættindi og skyldur hjá ríkjum:

Montevideo Convention on Rights and Duties of states art. 1: "The State as a person of internationational law should possess the following qualifications: (a) a permanent population; (b) a defined territory; (c) government; and (d) capacity to enter into relations with other states."

Her skal ikki vera gjørt so nógv við hesi einstøku krøvini. Tey trý fyrstu eru rættiliga sjálvsøgd. Tó skal sigast, at krøvini til (a) fastbúgvandi fólk og (b) definerað landaøki ikki eru strong. Heldur ikki kann ov nógv leggjast í kravið um eina stjórn eftir (c). Helst krevst bert eitt ella annað slag av einum stjórnarvaldi, ið ikki verður avmarkað til útinnandi vald, men skal skiljast

[1] Hurst Hannum, "Autonomy, Sovereignty, and Self-Determination," 1996 (Hannum 1996) s. 15.

[2] Ole Spiermann, "Moderne folkeret" 1999, (Spiermann 1999) kap. 1. Og s. 159, 171-172 og 205-206
og Alan James, "Sovereign Statehood – The Basis of International Society" 1986 (James 1986) s. 40 og 146.

sum stjórnarvald sum heild.[3] Av serligum áhuga her er at skilja millum ásetingarnar í Montevideosáttmálanum (a) - (c) ímóti (d). Mótvegis (d) eru (a) - (c) grundleggjandi krøv, ið leingi hevur verið semja um. Kendi týski løgfrøðingurin Georg Jellinek kallaði hetta læruna um tey trý elementini, *"Dreielementen Lehre"*.[4] Fyrr var vanligt at vísa til hesi trý krøvini, tá ríkið bleiv lýst. Hesi eru eisini nøktandi, tá hugsað verður um, at ein politisk eind skal kunna virka sum ríki heima hjá sær sjálvum, hava ríkisrættarligt fullveldi. Við tíðini fóru menn tó at tosa um eitt fjórða krav. Hetta var, at politiska eindin hartil skuldi vera sjálvstøðug ímóti umheiminum *(independent)*.[5] Ásetingin í grein 1, bókstavi (d) í Montevideosáttmálanum kann skiljast í ljósinum av hesum fjórða kravi.[6] Sum greitt frá niðanfyri, er hetta fjórða kravið tað, ið skal til um ein eind altjóðarættarliga (úteftir) skal vera mett sum eitt ríki, hava altjóðarættarligt fullveldi, um fullveldi yvirhøvur er rætta heitið fyri hesa støðuna.

Fullveldishugtakið

Í gomlum døgum bleiv fullveldi ofta sett í samband við ein ítøkiligan persón, ið sum valdsharri ella fúrsti hevði evsta og endaliga valdið í einu ríki. Framvegis hoyrist onkuntíð um fullveldi sum fólkafullveldi (fólkasuverenitetur) ella tingsfullveldi (parlamentssuverenitetur). Og framvegis gevur tað eisini meining at kjakast um, hjá hvørjum persóni ella stovni í einum ríki, fullveldi liggur.[7] Liggur t.d. mest grundleggjandi valdið í Danmark hjá fólkinum, stjórnini og fólkatinginum ella kanska grundlógargevaranum? Spurningurin um, hvar fullveldi meira ítøkiliga liggur hevur at gera við fullveldi ella endaligt vald *inni í* eini politiskari eind og er tí heilt øðrvísi enn spurningurin um, hvørt ein ávís politisk eind *í sær sjálvari* hevur endaligt vald. Hetta meira ítøkiliga fullveldishugtakið er av einum slagi, sum liggur heilt uttanfyri fullveldishugtakið í hesi grein. Her verður meint við ein í dag meira vanligan týdning av fullveldishugtakinum, sum er tann serligi kvalitetur av valdi, ið er ein fyritreyt fyri at vera ein

[3] Sí Spiermann 1999, s. 173-77.

[4] Sí Krystyna Marek " Identity and Continuity of States in Public International Law" 1968, (Marek 1968) s. 183 um læruna hjá Jellinek.

[5] Sí Alfred M. Kamanda, "A Study of The Legal Status of Protectorates in Public International Law" 1961, (Kamanda, 1961) s. 177.

[6] Sí t.d. Ian Brownlie, "Principles of Public International Law" 5 ed. 1998, s. 71.

[7] T.d. James 1986, s. 51 og Stanley I. Benn, "The Uses of Sovereignty", s. 68 í W. J. Stankiewicz (red) "In Defense of Sovereignty" 1969 (Stankiewicz 1969). Soleiðis er kjak um, hvar fullveldið meira ítøkiliga liggur framvegis vanligt innan politiska heimspeki og fólkaræðisástoði. Eitt nú er enn vanligt í USA at nýta fullveldi í hesi merking, tá gjørt verður vart við, at endaliga valdið liggur hjá fólkinum heldur enn tess umboðum.

javntsettur viðleikari (aktørur) í altjóða samfelagnum, sum bert ein serstøk óítøkilig (abstrakt) politisk eind, ríkið, hevur.[8]

Tað kundi verið hóskandi at byrja fullveldislýsingina við at endurtaka ein klassikara, nevniliga tað, dómarin í fasta altjóða dómstólinum PCIJ, Anzilotti segði í málinum um ta ætlaðu tollsamgonguna millum Týskland og Eysturríki í 1931. Týskland hevði í grein 80 í Versaillessáttmálanum bundið seg til at virða eysturríska sjálvstøðu, meðan Eysturríki sambært grein 88 í friðarsáttmálanum frá Saint-Germain hevði átikið sær ikki at koma sínari sjálvstøðu í vanda (*"compromise her independence"*) uttan loyvi frá Ráðnum í Fólkasamgonguni ella í stríð við frumskjal (*protokol*) nr. 1 (undirritað í Genéve í oktober 1922) *"to give any State a special régime or exclusive advantages calculated to threaten this independence"*. Anzilotti segði her um tað at hava sjálvstøðu: [9]

...the independence of Austria within the meaning of Article 88 is nothing else but the existence of Austria, within the frontiers laid down by the treaty of Saint-Germain, as a separate state and not subject to the authority of any other State or group of States. Independence as thus understood is really no more than the normal condition of States according to international law; it may also be described as sovereignty (suprema potestas), or external sovereignty by which is meant that the state has over it no other authority than that of international law.[10]

Henda lýsingin av sjálvstøðu hevur tvey lið. Fyrst má ríkið vera leyst *(separate)* av øðrum ríkjum. Hetta vil siga, at rættarskipanin (ríkisrætturin) stendur einsamøll og ikki er bundin í einum ríkisrættarligum felagsskapi, sum tað er kent frá samveldisstatum. Tað sum liggur í hesum er sostatt, at ríkið bert er bundið av altjóðarætti og ikki av ríkisrætti, *"has over it no other*

[8] Sí eisini viðmerkingarnar á síðu 7. Annars varð hendan broytingin, har fullveldishugtakið fer frá at verða sett í samband við einstakan persón ella stovn til heldur at verða tengt at ríkinum sum heild, fullført fyri umleið tveimum øldum síðani við heimspekinginum Hegel. Hon er vorðin nevnd "koperniska viðvendið", tí talan var um at venda gomlu fatanini á høvdið. Sí Ole Spiermann "Enten & Eller – Studier i suverænitetsbegreber" 1995 (Spiermann 1995) s. 87ff. Hetta merkir tó ikki, at fullveldisríkini bert hava um tveyhundrað ár á baki, men bert, at hugsanin um endaligt vald, fullveldi, áðrenn hetta mest snúið seg um meira ítøkiligt vald *í einum ríki*, meðan tað eftir hetta meira hevur verið vanligt at hugsa um *sjálvt ríkið* í hesum sambandi.

[9] Hóast hetta er ein lýsing av sjálvstøðu (independence), so er tað eisini ein lýsing av fullveldinum, tí síðstnevnda er ein treyt fyri fyrstnevnda.

[10] PCIJ Series A/B No. 41 (1931), s. 57.

authority than that of international law". At ríkið bert er bundið av altjóðarætti og ikki ríkisrætti kann eisini kallast *ríkissrættarlig sjálvstøða,* tí ríkið sum nevnt hevur eina sjálvstøðuga rættarskipan.[11] Í øðrum lagi má ríkið ikki vera undir valdinum hjá nøkrum øðrum ríki, "*not subject to the authority of any other State or group of States*". Hetta seinna sigur ikki í sær sjálvum so nógv um fullveldi sum um sjálvstøðu.

Hóast lýsingin hjá Anzilotti er heldur almenn og óítøkilig, so lýsa hesi bæði liðini, hvat ið skal til fyri at ein politisk eind løgfrøðiliga kann vera fult sjálvtøðug; tað vil siga at hava bæði fullveldi og vera sjálvstøðugt í altjóðarætti. Men tað hevur eisini verið havt at hesi lýsing, tí hon ikki ger mun ímillum (serliga útlendis) fullveldi og sjálvstøðu.[12]

Fullveldi og sjálvstøða

Tá tosað varð um fullveldi bleiv upprunaliga meint við innlendis fullveldi. Tað er inneftir at hava evsta vald yvir landi og fólki. Útinna myndugleikarnir hinvegin valdið yvir landi og fólki mótvegis umheiminum, er talan um útlendis fullveldi. Fullveldi, serliga útlendis fullveldi, hevur tætt samband við sjálvstøðu. Fullveldi og sjálvstøða verða soleiðis ofta nýtt hvørt um annað, sum talan var um sama fyribrigdi. Men tað er ein heilt prinsipiellur munur.

Ein greiður máti at lýsa munin millum fullveldi og sjálvstøðu er at ímynda sær, at bert eitt ríki var í øllum heiminum. Hetta ríki vildi havt fullveldi, tí myndugleikarnir høvdu fult vald á landøkinum og fólkinum. Men tað hevði ikki givið meining at sagt, at hetta ríki var sjálvstøðugt, tí onki annað ríki var til, ið tað kundi hoyrt undir. Tá støðan nú er tann, at fjøld av ríkjum eru til, sum mugu samstarva á onkran hátt, so uppstendur spurningurin, hvat vald hesi hava móti hvørjum øðrum. Her er tað vanliga so, at útlendis vald er ein náttúrlig leinging av fullveldinum (innlendis). Tað vald, myndugleikarnir hava inneftir, hava teir eisini náttúrliga úteftir. Hetta kann eisini sigast á tann hátt, at fullveldi er eitt *eindarhugtak*, tí keldan til bæði fullveldi úteftir og inneftir liggur á sama stað, sum er ríkissrætturin. Soleiðis skilt kann fullveldi ikki skiljast millum eina útlendis og eina innlendis síðu, tí hetta eru tvær síður av somu søk, júst sum tvær síður av eini mynt eru tað.[13]

---

[11] James 1986, kallar hetta "Constitutional Independence". Sí t.d. s. 24-25 og annars gjøgnum alla bókina. Vert er at leggja til merkis, at ríkisrættarlig sjálvstøða ikki er tað sama sum sjálvstøða í altjóðarætti.

[12] Sí Kamanda 1961, s. 179.

[13] Sí James, 1986 s. 50-57.

Ofta verður eisini tosað um sjálvstøðu og útlendis fullveldi sum eitt og tað sama. Ein orsøk til hetta kann vera, at ikki verður skilt millum fullveldi sum kvalitativt og kvantitativt hugtak. Fullveldi, ið er avleiðing av ríkisrættarligari sjálvstøðu, er ein kvalitetur, eitt ríki antin hevur ella ikki. Her kunnu innara og ytra síðan av fullveldinum ikki skiljast sundur. Útlendis fullveldi kann ikki takast upp við rót, uttan at fullveldi verður burtur og ríkið missur sína støðu sum ríki við fullveldi. Øðrvísi við sjálvstøðuni í altjóðarætti. Hon er kvantitativ[14]. Av tí at fullveldi hevur sína keldu í ríkisrættinum og ikki altjóðarætti, so er tað ikki upp til altjóðarætt at avgera, hvat ríki hevur fullveldi. Tað stig av luttøku í altjóða samfelagnum, eitt ríki er á, eigur í prinsippinum ikki at ávirka fullveldið. Næstan øll ríki eru tó sjálvstøðug, og hetta verður tí roknað sum vanliga støðan fyri eitt ríki.

Men ongin sigur, at hetta noyðist at vera so. Eitt ríki kann velja at lata uttanríkisvald sítt upp í hendurnar á øðrum ríki. Hetta ríki vil tá í størri ella minni mun ikki luttaka í altjóða samfelagnum. Dømi um slík ríki eru ávís av teimum fyrr so væl kendu varðlondunum *(protected states)* t.d. Marokko, Tunis og Kambodja. Hóast hesi ríki høvdu lítið vald og í eygunum á umheiminum ofta vórðu sammett við verulig hjálond, sum vóru partar av umveldinum hjá "móðurríkinum", so høvdu tey sjálvstøðuga rættarskipan og tí fullveldi. Við sáttmála høvdu teir latið síni uttanríkismál upp í hendurnar á "móðurríkinum". Men tað er ikki tað sama sum at siga, at keldan til teirra tilveru lá hjá "móðurríkinum". Keldan til teirra vald lá hjá teimum sjálvum og ikki nakrari fremmandari politiskari eind, tí teirra rættarskipan var ikki avleidd, men upprunalig (originer). Henda fatan av muninum millum fullveldi og sjálvstøðu er eisini stuðlað av fasta altjóða dómstólinum PCIJ og altjóða dómstólinum ICJ.[15]

Ástøðiliga ber væl til at fata munin millum eitt ósjálvstøðugt ríki bert við fullveldi og eitt ríki eisini við sjálvstøðu sum ein bert stigvísan (kvantitativan) mun. Ósjálvstøðuga ríkið hevur tó eisini útlendis fullveldi. Hetta er tí, at fullveldi er kvalitativt. Antin er tað har ella ikki. Ríkið hevur við sáttmála avmarkað sítt útlendis vald, sum tað ríkisrættarliga altíð kann

[14] Øðrvísi t.d. J. A. Andrews "The Concept of Statehood and the Acquisition of Territory in the Nineteenth Century", í The Law Quarterly Review 1978 s. 424-425, har fullveldi verður sagt at vera relativt, meðan sjálvstøða hinvegin verður søgd at vera eitt absolutt hugtak, ið antin er hjá ella frá.
[15] Sí Kamanda 1961, s. 183.

endurreisa.[16] Men uppgevur eitt ríki størri part enn eitt ávíst - tað er ringt at siga neyvt hvussu nógv[17] - av sínum útlendis valdi, verður tað ikki longur mett at vera fullur limur í altjóða samfelagnum. Altjóðarættarliga verður tað tá ikki veruliga mett sum ríki, og hetta má í praksis sigast at merkja eina grundleggjandi øðrvísi støðu fyri ríkið. Hetta kemur eitt nú til sjóndar á tann hátt, at ST-stovningarsáttmálin ikki nevnir hesar eindir ósjálvstøðug ríki *(dependent states)*, men umveldi *(territory)*, ið høvdu sjálvsavgerðarrætt á sama hátt sum tey veruligu hjálondini. Heldur ikki verður hildið, at ósjálvstøðug ríki kunnu gerast limir í ST.

Tað skal verða gjørt vart við, at fleiri løgfrøðingar hava verið ósamdir við hesa fatan, at eitt ríki kann vera til og hava fullveldi, uttan eisini at vera sjálvstøðugt. Hans Kelsen var ein tann kendasti, men eisini hevur henda fatan verið vanlig í altjóðarættarligum verkum um ríkishugtakið. Meining Kelsens er í stuttum, at altjóðarættur er yvir ríkisrættinum, og at ríkisrætturin, og við honum fullveldið, hevur sína keldu í altjóðarætti. Tá so fullveldið kemur frá altjóðarætti kann ongin politisk eind, sum ikki er sjálvstøðug í altjóðarætti hava fullveldi, men bert vera partur av ríkisrættinum hjá einum sjálvstøðugum ríki.[18] Eftir hesu fatan hevur altjóðarættarsamfelagið eina sjálvstøðuga tilveru og er kelda til ríkini.[19]

Henda fatan Kelsens er í stríð við gomlu læruna sum t.d. Georg Jellinek hevði, og sum bæði altjóða- og fasti altjóða dómstólurin hava havt. Henda fatan, sum sigur, at ríkini eru kelda til altjóðarætt heldur enn øvugt er helst rættari.[20] Tí gevur tað eisinj meining at tosa um, at ríki eru til, hóast ikki sjálvstøðug í altjóðarætti. Hetta samsvarar eisini betri við tann søguliga veruleika, at ríkini vóru til upprunaliga, meðan altjóðarættur so líðandi er vaksin fram sum ein avleidd rættarskipan.

---

[16] Soleiðis eisini Ivan Bernier "International Legal Aspects of Federalism", London 1973, (Bernier 1973) s. 129.

[17] Hetta viðger James Crawford í ljósinum av altjóðarættarpraksis í bókini "The Creation of States in International Law", Oxford 1979, (Crawford 1979) serliga s. 48-71.

[18] Sí Hans Kelsen "Principles of International Law" 1966, 2 útg. við Robert W. Tucker, s. 191ff., 575 og 580. Eisini Marek 1968, s. 184-186, sum er eitt av viðhaldsfólkum Kelsens og endurgevur hansara meining so væl.

[19] Tað er hesa fatan Spiermann kallar "folkeret bestemmer suverænitet", sí Spiermann 1999, s. 22, 159, 171-172 og 205-206.

[20] Hetta kallar Spiermann "suverænitet bestemmer folkeret", sí Spiermann 1999, s. 22.

Fyri støðu Føroya í løtuni hevur henda lýsing av muninum millum fullveldi og sjálvstøðu eisini praktiskan áhuga. Ein av teimum loysnum, ið víst hevur verið á í føroyska fullveldiskjakinum, er frælsur felagsskapur *(Assosiated Statehood)*. Henda skipan, sum er íkomin gjøgnum royndir frá ST at avtaka hjálandastøðuna hjá gomlu hjálondunum, kann skiljast sum ein roynd at tillaga skipanina við varðlondunum til politiskar eindir, sum av einhvørjari orsøk skuldu hava eina sjálvstýrisskipan, ið ikki rakk heilt til fulla sjálvstøðu. Henda skipan er sostatt ógvuliga lík støðuni, ávís av gomlu varðlondunum høvdu.[21] Hesi ríki hava eisini fullveldi, men eru ósjálvstøðug, tí altjóðarættarliga sjálvstøðan er latin upp í hendurnar á "móðurríkinum".[22] Einasti veruligi løgfrøðiligi munurin á varðlondunum og londum í frælsum felagsskapi er tann rættur, síðstnevndu hava eftir sáttmálanum til einvíst at uppsiga avtaluna og gerast sjálvstøðug. Nøkur av hesum londum í frælsum felagsskapi hava tó eisini sjálvstøðu. Tá Hvítabók sigur, at summi av hesum londum hava fullveldi og summi ikki, so má tað tulkast so, at Hvítabók, sum eisini er vanligt í altjóðarættarligum bókmentum, ikki skilir ímillum fullveldi og sjálvstøðu.[23]

Í seinastuni hevur verið tosað um, at føroyska grundlógin kann verða sett í gildi uttan at Føroyar hava fingið fullveldi. Hetta má tó ikki hava ta misskiljing við sær, at grundlóg og ríkisrættur ikki eru avgerandi rættarlig fyribrigdi í fullveldishøpi. Tey eru altavgerandi. Kemur føroyska grundlógin í gildi uttan fullveldi, verður tað á tann hátt, at Føroyar samstundis verða bundnar at donsku grundlógini ella donskum ríkisrætti á onkran hátt.[24] Tí skulu Føroyar hava sína sjálvstøðugu grundlóg og ríkisrætt, uttan eisini at vera bundnar at donskum ríkisrætti, so eru tær í hvussu er objektivt í eini fullveldisstøðu. Hetta kann eisini sigast á tann hátt, at eitt ríki ikki bert er eitt

[21] Sí Hannum 1996, s. 17 og James 1986, s. 104.

[22] Alan James kemur tó gjøgnum nakrar ógvuliga tekniskar grundgevingar á s. 104 - 105 til tað niðurstøðu, at lond í frælsum felagsskapi ikki hava ríkisrættarliga sjálvstøðu og tí ikki fullveldi. Grundgevingarnar eru serliga tær, at móðurríkið einvíst kann uppsiga sáttmálan og at undirríkið hinvegin ikki einvíst kann broyta, men bert uppsiga felagsskapin. Tá týdningarmikil viðurskifti í grundlógini hjá undirríkinum sostatt kunnu broytast av fremmandum valdi skal grundlógin ikki vera sjálvstøðug og fullveldi ikki til staðar. Hetta ávirkar tó ikki, at minna landið hevur egnan ríkisrætt og egið landøki og bert er bundið at størra landinum gjøgnum altjóðarættarligan sáttmála. Valdið hjá móðuríkinum (tað einsíðuga) gongur eisini bert út uppá at uppsiga sáttmálan og tí geva størri frælsi til varda landið. Tí kann ein slík grundgeving neyvan góðtakast.

[23] Hvítabók s. 70. Sí eisini s. 94 um sjálvstøðu í ríkishugtakinum.

[24] Tað má viðmerkjast, at tað her er líkamikið, hvørt ríkisrætturin er skrivaður ella á hægri stigi enn vanlig lóggáva.

rættarligt fyribrigdi, men eisini eitt sosialpolitiskt ella sosiologiskt fyribrigdi. Summi vilja halda, at eitt ríki fyrst og fremst er eitt sosiologiskt fyribrigdi, sum tó eisini altíð hevur eina rættarliga síðu.[25] Tá so er, at rættarliga og sosiologiska síðan av ríkishugtakinum fylgjast, so er eisini greitt, at ein eind, ið er partur av øðrum ríki eisini á onkran hátt er undir sama ríkisrætti sum hetta ríki. Eru vit sostatt saman um eitt ríki, so eru vit eisini saman um ríkisrætt. Hyggja vit okkum um í heiminum, síggja vit eisini, at deilríki í samveldisríkjum hava egnan ríkisrætt og grundlóg, meðan tey tó samstundis eisini eru í ríkisrættarligum felagsskapi við hini deilríkini og samveldismyndugleikarnar. Allar aðrar politiskar eindir í heiminum, sum hava egnan ríkisrætt, men ikki samstundis eru í ríkisrættarligum felagsskapi, eru í eini slíkari støðu, at tað kann grundgevast fyri, at tær hava fullveldi.

Fullveldi sum ríkisrættarlig sjálvstøða ella rættarligt frælsi

Longu ein av fedrunum at altjóðarætti, niðurlendingurin Hugo Grotius (1583-1645), skilti millum tveir løgfrøðiligar týdningar av fullveldinum. Hann skilti ímillum almenna, "generella", rættin at ráða (*imperium generale*) og serstaka, "partikulera", rættin at ráða (*imperium proprium*). Almenni rætturin at ráða leggur seg upp at veruliga fullveldinum (*majestas realis*), ið liggur hjá einum ríki ella fólki sum heild. Hinvegin leggur serstaki rætturin at ráða seg upp at persónliga fullveldinum, ið fólkið í einum ríkið ofta vil lána út til eitt nú ein kong ella aðal. Men hetta seinna er júst ikki eitt veruligt fullveldi, tí tað er ikki latið til ognar, men bert til láns.[26] Munurin millum hesi bæði kann eisini skiljast sum hetta at eiga fullveldi mótvegis, hvussu frítt ein kann nýta síni fullveldisrættindi, tí tey kanska eru latin øðrum til láns. Hóast hesir tankar hjá Grotius høvdu at gera við fullveldi inni í einum ríki, so kunnu teir eins væl nýtast um viðurskiftini millum eitt ríki og altjóðarætt. Á føroyskum kunnu vit kalla hetta ávíkavist "alment fullveldi" (*majestas realis* og *imperium generale*) og "serstakt fullveldi" (*majestas personalis* og *imperium proprium*).

Síggja vit burtur frá serliga kjakinum um fullveldi í samveldisríkjum, kunnu vit siga, at hetta almenna fullveldi ikki kann býtast sundur.[27] Hetta fullveldi

[25] Sí Lech Antonowicz, "Definition of State in International Law Doctrine" í The Polish Yearbook of International Law I 1966/67, s. 196.

26 Sí Carl Joachim Friedrich, "The Philosophy of Law in Historical Perspective", 2.útg. Chicago 1963, s. 65 og Spiermann 1995, s. 59.

[27] Tað er tó eisini ivasamt, um fullveldið í samveldisríkjum veruliga er býtt sundur. Summi vilja halda, at bert politiski myndugleikin í samveldisríkjum er sundurbýttur, men ikki fullveldið. Í tí sambandi verður víst á, at fullveldi upprunaliga merkir endaligt vald, og at hvørki deilríki ella samveldismyndugleikar vanliga hava

er nakað, ein politisk eind antin hevur ella ikki. Hetta fullveldi er sostatt kvalitativt og er ein avleiðing av ríkisrættarligari sjálvstøðu. Harafturímóti kann serstakt fullveldi vera skilt sum rættarligt frælsi. Eftir hesum seinna týdningi vil ein og hvør altjóðarættarligur sáttmáli vera ein avmarking í fullveldinum. Hetta er sostatt eitt kvantitativt fullveldishugtak. Men tað er vert at leggja til merkis, at serstakt fullveldi, ella fullveldi sum rættarligt frælsi, ikki kann vera mist, men bert skert, tí ríkið hevur fullveldi í meira vanligu merkingini, nevniliga alment fullveldi.[28]

Kendi Wimbledon-dómurin verður ofta nýttur til at lýsa munin millum serstakt og alment fullveldi. Í hesum máli søgdu týskir myndugleikar frammanfyri PCIJ, at skyldan, ið Versaillessáttmálin legði á Týskland, at halda Kiel-kanalina opna fyri førum frá øllum tjóðum, ið høvdu frið við Týskland, ikki skuldi tulkast bókstavliga, tí ein slík tulking hevði við sær, at Týskland hevði mist ein avgerandi lut av sínum fullveldi. Dómstólurin var tó ikki samdur við týsku myndugleikarnar í hesum og segði, at hann ikki vildi:

"see in the conclusion of any Treaty by which a State undertakes to perform or refrain from performing in a particular act an abandonment of its sovereignty. No doubt any convention creating an obligation of this kind places a restriction upon the exercise of sovereign rights of the State, in the sense that it requires them to be exercised in a certain way. But the right of entering into international engagements is an attribute of State sovereignty."[29]

Dómstólurin noktaði ikki fyri, at frælsið hjá Týsklandi var skert á serstøkum øki. Hetta meinti dómstólurin tó ikki vera tað sama sum at uppgeva fullveldið, tí rætturin at gera altjóða avtalur er júst ein eginleiki, ið fylgir av fullveldinum. Í hugaheiminum hjá dómarunum í PCIJ, var fullveldi sostatt kvalitativt sum ríkisrættarlig sjálvstøða og ikki kvantitativt sum rættarligt frælsi.

At orðið fullveldi bæði verður nýtt um tann kvalitativa almenna rættin at ráða og tann serstaka rættin at ráða, sum er kvantitativur, er sjálvsagt ørkymlandi, serliga tá havt verður í huga, at hetta oftast verður gjørt, uttan at tilskila í hvørjum føri talan er um ta eini ella aðru merkingina. Serliga í ES-

sjálvstøðugt vald á grundlógargevandi myndugleikanum. Tí hava tey heldur ikki endaligt vald hvør sær. Um hetta, Bernier 1973, s. 17 - 33.

[28] Um fullveldi sum rættarligt frælsi, James 1986, s. 205ff.

[29] Case of the S. S. Wimbledon, frá 28 juni 1923, PCIJ Series A no. 1 s. 25.

høpi er tað vanligt, at avmarking í valdinum hjá limalondunum verður kallað at lata fullveldi frá sær. Soleiðis kallaði longu danska grundlógarnevndin frá 1946, í sínum álitið frá 1953 (responsum frá Max Sørensen), tað at lata fullveldi frá sær, at núverandi § 20 í grundlógini heimilar, at Danmark letur frá sær slíkt vald, sum annars hoyrir undir ríkisins myndugleikar.[30] Eisini í ES-rættarligum bókmentum verður vanliga tosað um at lata fullveldi frá sær, uttan at siga nakað um, hvat slag av valdi ella fullveldi talan er um.[31] Fullveldistosið í ES høpi knýtir seg tó ikki bert til fullveldi sum rættarligt frælsi, men eisini, og kanska serliga, til fullveldi sum løgdømi, ið verður viðgjørt í næsta parti. Hartil skal nevnast, at fullveldi sum rættarligt frælsi og fullveldi sum løgdømi ofta kunnu vera ring at skilja sundur.

Fullveldi sum løgdømi

Fullveldi sum ríkisrættarlig sjálvstøða, sum í hesi grein verður mett at vera avgerandi, verður eisini álopið av teimum, ið halda, at tað er meira avgerandi, at ríkið í øllum viðurskiftum hevur einarætt at ráða yvir landøki og borgarum. Hetta er eitt fullveldishugtak, sum leggur seg upp at, at ríkið eina skal hava løgdømi (eksklusiva jurisdiktión). Her verður tað ikki hildið at vera avgerandi at fara heilt í rótina í rættarskipanini at finna fullveldið, men heldur verður hugt at, hvussu tað verður útint í praksis.

Fullveldi sum einarættur til løgdømi kann býtast upp í fýra partar.[32] Fyri tað fyrsta má tað, fyri at fullveldið skal standa, ikki vera nøkur skylda móti útlendis valdi, tá ríkið útinnir sítt vald. Í øðrum lagi má ríkið veruliga (faktiskt) hava einarætt til løgdømi á sínum landøki. Ongir lummar av fremmandum løgdømi mugu vera. Sum tað triðja mugu allir rættarspurningar avgerast inni í landinum. Soleiðis mugu borgararnir ikki hava loyvi til at kæra avgerðir hjá einum ríkissvaldi til nakran fremmandan myndugleika. Ríkisdyrnar mugu so at siga vera afturlatnar fyri teimum innanfyri. Fjórði mátin at síggja sjálvstøðugt løgdømi sum avgerandi er, at tað ikki mugu vera partar av samfelagslívinum í einum stati, ið beinleiðis eru undir valdinum hjá fremmandum myndugleika.[33]

---

[30] Betænkning nr. 66, 1953 s. 124ff. § 20 í donsku grundlógini knýtir seg serliga at tí niðanfyri lýsta fjórða mátanum at skilja fullveldi sum sjálvstøðugt løgdømi. Sí Jens Hartig Danielsen "Suverænitetsafgivelse" 1999, (Danielsen 1999) serliga kap. 2.

[31] T.d. Hjalte Rasmussen "EU-ret i kontekst", 2 útg. 1995, s. 91ff. og Danielsen 1999.

[32] Hesin parturin av greinini fylgir neyvt James 1986, s. 225-254.

[33] Sí t.d. Alf Ross, "Lærebog i folkeret" 6 udg. s. 15 um "højeste retsmagt" sum avgerandi.

Kjarnin í tí fyrsta mátanum at síggja fullveldi sum løgdømi er, at ríkið kann gera við síni innlendis mál júst sum tað vil uttan at hugsa um, hvat umheimurin heldur. Hetta fullveldi er sostatt eitt alvald. Hetta er rættiliga klassiskt og gongur t.d. heilt aftur til Jean Bodin, sum segði, at fullveldi er eitt varandi og fult vald innanfyri eitt ríki. Hetta fullveldishugtakið hevur neyvan nakrantíð verið serliga veruligt. Fleiri meginreglur í altjóða siðvenjurætti, sum t.d. diplomatrætturin og rættindini hjá fremmandum ríkissborgarum, bróta inn á hesa fullveldisfatanina. Eisini eru nógv dømi um, at lond við sáttmála binda seg sjálvi móti umheiminum til ikki at gera eitthvørt á egnum landøki. Eitt dømi er Parisarasáttmálin frá 1856, sum neutraliseraði Svarta Havið og pliktaði Russland at niðurleggja flotaherstøðir sínar við Svartahavsstrondina. Fleiri dømi kundu verið nevnd í hesum sambandi. Vanliga verða slíkar bindingar ikki mettar at broyta støðuna hjá ríkinum sum ein politisk eind við fullveldi, hóast tey rættindi, sum fylgja av fullveldinum eru avmarkaði.[34]

Næsta fatanin av fullveldinum sum løgdømissjálvstøðu snýr seg ikki bert um skyldur móti umheiminum, men at fremmant ríki ikki má kunna útinna sítt stjórnarvald á landøkinum hjá viðkomandi ríki. Hetta hevur við væl kendu grundregluna um landøkisyvirvaldið *(territorialhøjhedens grundsætning)* at gera. Eftir hesi grundreglu í altjóða siðvenjurætti má onki ríki útinna sítt stjórnarvald á fremmandum landøki. Kend dømi um brot á hesa grundreglu eru t.d., tá ísraelskir agentar fóru inn í Argentina eftir Eichmann, tá menn Stalins fóru inn í Meksiko at myrða Trotsky og tá franskir agentar søktu Rainbow Warrior í New Zealandi . Men tað eru ógviliga nógv dømi um, at henda grundregla verður sett til síðis við sáttmála millum lond. Eitt dømi er Svalbardsáttmálin, sum gevur øðrum londum rætt til námsvinnu á norskum landøki. Meira vanligt enn hetta er, at ríki hevur herstøðir í øðrum landi og á henda hátt útinnir eitt ávíst stjórnarvald í hesum fremmanda ríki. Dømi um hetta eru USA í Danmark (Grønlandi) og USA í Týsklandi.[35] Sáttmálar um løgsaknarundantøkni *(ekstraterritorialitet)* eru alt ov vanligir til, at hetta kann skiljast sum undantak til nakað, ið hevur við kjarnina í fullveldishugtakinum at gera.[36]

Ímóti fyrstu og aðru fatan av fullveldinum sum løgdømi, eru triðja og fjórða meira áhugaverdar. Triðja fatanin av fullveldinum sum løgdømi er, at allir rættarspurningar skulu avgerast av dómstólum í landinum. Ongin møguleiki má vera fyri kæru til fremmandan dómstól. Grotius segði longu tíðliga í 17

[34] Um hetta fullveldishugtakið James 1986, s. 228-232.
[35] Sí um hesar "jurisdiktionsaftaler", Danielsen 1999, s. 38ff.
[36] James 1986 viðger hetta á s. 232-240.

øld, at tað vald er fult (suverent), hvørs avgerðir ikki kunnu ógildast av øðrum mannavilja. Hetta fullveldishugtakið kann eisini hava konkretan áhuga fyri Føroyar. Í sambandi við føroysku fullveldisætlanina varð sum kunnugt eina tíðina tosað um sokallaðu íslendsku skipanina. Henda skipan hevði møguliga havt við sær, at danski hægstirættur eisini skuldi verið ovasti dómstólur í føroysku rættarskipanini. So kann verða spurgt, um tað hevði verið sambæriligt við føroyskt fullveldi, at fremmandur dómstólur hevði síðsta orðið at siga í mest grundleggjandi rættarspurningunum viðvíkjandi føroysku rættarskipanini. Frederik Harhoff hevur sáað iva um hetta. Í áliti til landstýrið um fullveldisætlanina sigur Harhoff m.a.:

"Det er imidlertid i relation til suverænitetsspørgsmålet ikke helt indlysende, når koalitionsaftalen lægger op til en "overenskomst" med Danmark om bl.a. udenrigs- og domstolsområderne, for netop disse områder må alt andet lige være blandt de første, der omfattes af den suveræne færøske stats *uindskrænkede* kompetence. Hvis tanken med denne overenskomst er, at dele af fx den danske Højesteret skal være fælles øverste dømmende myndighed i de to stater, må man sige at en sådan ordning principielt udelukker folkeretlig suverænitet for Færøerne;"[37]

Tá Harhoff tosar um altjóðarættarligt fullveldi, meinar hann helst sjálvstøðu. Og tá fullveldi er treyt fyri sjálvstøðu, meinar hann helst eisini við bæði fullveldi og sjálvstøðu, tí tað er ringt at síggja, hvat felags hægstirættur í sær sjálvum hevur við altjóðarættarliga sjálvstøðu at gera. Men er hetta nú rætt? Áðrenn nakra niðurstøðu má vera hugt at praksis og hvussu hetta fyribrigdi tá hevur verið mett í einum fullveldissambandi.

Hóast talið er minkandi, so hava fleiri av londunum í bretska Commonwealth varveitt kærurætt til sonevnda Privy Council, sum hevur verið eitt slag av felags ovasta dómstóli. Fleiri røddir hava viljað verið við, at kærurættur til hetta ráð ikki er sambæriligur við fullveldið hjá viðkomandi londum. Hóast hetta hava fyrrverandi og núverandi limirnir í Commonwealth við kærurætti til Privy Council altíð verið mett at vera ríki við fullveldi.[38] Hetta ávirkar ikki ríkisrættarligu sjálvstøðuna, og besti máti at skilja hetta fyribrigdi er helst, at fremmandi dómstólurin verður partur av rættarskipanini hjá viðkomandi ríki. Soleiðis hevði danski hægstirættur sum stovnur bert arbeitt fyri tvær ymiskar rættarskipanir, skuldi hann eisini verið føroyski hægstirættur. Vit kunnu tí siga, at talan funktiónelt hevði verið um

[37] Sí Frederik Harhoff "Arbejdsnotat om fremgangsmåden ved en eventuel færøsk udskillelse af rigsfællesskabet 9/6 – 1999, s. 2." Finst á fullveldisheimasíðuni.
[38] James 1986, s. 242 og Hannum 1996, s. 15.

tveir dómstólar, hóast organisatoriskt tann sami. Tað er tí ikki lætt at skilja, hvat Harhoff nærri grundar sína fatan á.[39]

Europeiski mannarættindadómstólurin í Strasbourg er ein dómstólur, sum hevur stóra ávirkan á rættarmentanina hjá teimum londum, ið hava góðtikið hansara løgdømi. Dómarnir, sum verða sagdir av hesum dómstóli verða næstan altíð virdir av limalondunum. Tað sjónarmiðið hevur eisini verið frammi, at tey ríki, sum hava lagt seg undir løgdømið hjá hesum dómstóli hava avmarkað sítt fullveldi. Men hetta er øðrvísi enn omanfyrinevnda dømi. Her er vanliga ikki talan um, at dómstólurin sum stovnur verður partur av rættarskipanini hjá einum limalandi. Her er ikki talan um ein ríkisrættarligan, men um ein altjóðarættarligan dómstól. Og tá ríkisrættur og altjóðarættur eru tvær heilt ymiskar rættarskipanir, er inntrivið móti fullveldinum í prinsippinum ikki størri við at leggja seg undir slíkan dómstól enn at lata seg binda av altjóðarætti sum heild.[40]

Sum fjórða og kanska mest umstríddа fullveldishugtakið í sambandi við løgdømissjálvstøðu, skal sokallaða omantjóða (supranationala) fyribrigdið verða umrøtt. Eitt av serligu eyðkennunum fyri hesa skipan er, at meðan vanligir altjóða felagsskapir bert binda ríkini uttan beinleiðis at kunna útinna sín myndugleika í limaríkjunum, fer omantjóða felagsskapurin harafturímóti beinleiðis inn í ríkið og bindir veruligar og løgfrøðiligar persónar. Hetta slag av felagsskapi er eisini blivið nevnt *funktiónell føderalisma*, tí skipanin í mongum líkist skipanini í einum samveldisríki. Felagsskapirnir, sum hava fingið heiti omantjóða felagsskapir eru teir felagsskapir, ið standa aftanfyri tað vestureuropeiska samstarvið, sum byrjaði tíðliga í 1950-árunum og í dag verður kallað ES. Innanfyri tey mál, sum serliga eru latin yvir til ES stovnarnar er ES soleiðis hægsta rættarvald yvir borgarunum. Hetta hevur sostatt við sær eina avmarking í tí løgdømis frælsi, ríkini høvdu. Spurningurin er so, um ein slík støða er sambærilig við fullveldi.

[39] Tað skal leggjast afturat, at tað eisini er við síðuna av, tá Harhoff meinar, at altjóðarættarlig sjálvstøða er ósambærilig við samstarv á uttanríkisøkinum. Tað avgerandi er, um hjálpar (ella móður) ríkið meira útinnir uttanríkisviðurskiftini eftir boðum (direktivum) frá tí veikara ríkinum enn sjálvstøðugt uttan at lurta eftir veikara ríkinum í hvørjum einstøkum føri. Men tá talan er um eina reina fulltrúaskipan (agentur) sum íslendska skipanin, ið landstýrið miðaði móti, er ongin ivi um, at hon er fult sambærilig við sjálvstøðu og harvið eisini fullveldi. Sí Crawford 1979, serliga s. 54.

[40] Um hetta James 1986, s. 240-245.

Hóast ES í ávísan mun minnir um eitt samveldisríki, so er talan grundleggjandi um eina altjóðarættarliga skipan, hóast hon er av øðrvísi slagi enn vanligt.[41] ES hevur soleiðis ikki nakra grundlóg, men byggir á eina sáttmálaskipan. Ríkini hava ongantíð uppgivið sítt fullveldi í týdninginum ríkisrættarlig sjálvstøða. Og tá kjarnin í fullveldinum meira melur um hetta hugtak enn einarætt til løgdømi, mugu limalondini í ES framvegis metast sum ríki við fullveldi.[42] Men tað kann tó væl hugsast, at økt integratión við tíðini hevur við sær, at ríkisrættarliga sjálvstøðan bert verður eitt tómt skal. Tað kann koma ein tíð, tá ein verður noyddur at góðtaka, at talan bert er um tóma formalismu, um hildið verður, at limalondini hava fullveldi, og at sáttmálaskipanin í veruleikanum meira er ein grundlóg enn nakað annað.

Hetta kann vera ein meira sníkjandi háttur, ið ríkini kunnu missa sína ríkisrættarligu sjálvstøðu uppá og verða innlimað í størri samveldisríki. Hin mátin kundi verið ein formlig avtøka av ríkissrættarligu sjálvstøðuni á eini felags ráðstevnu. Men sum støðan sær út í dag, so hava ES-limalondini framvegis sína formligu ríkisrættarligu sjálvstøðu, sum ikki er tóm, men framvegis fylgd av so nógvum veruligum valdi, at limalondini hvørt í sær á flestu økjum eru sum onnur ríki í heiminum. At ES so í ávísan mun er hægsta rættarvald kann ikki vera avgerandi.[43]

Samanumtikið er onki í vegin við at nýta orðið fullveldi um einarætt til løgdømi. Hetta fylgir longu av tí, at løgdømi, ella vald á egnum øki, er ein avleiðing av (innlendis) fullveldinum. Tað má bert vera gjørt greitt, at hetta fullveldishugtakið als ikki er eins grundleggjandi og ríkisrættarliga sjálvstøðan. Fullveldi sum ríkisrættarlig sjálvstøða er altavgerandi í skapanini og varveitsluni av einum ríki, meðan fullveldi sum einarættur til løgdømi ikki er tað.

---

[41] Ein heldur óvanlig, men sera hugkveikjandi, lýsing av ES-rættinum sum altjóðarætti finst í Spiermann 1999, kap. 16 og s. 207-208. Og um at limalondini aldri hava uppgivið sítt fullveldi, Ole Spiermann, "i nærmere bestemt omfang" om Danmark, suveræniteten og Den Europeiske union. Juristen 1997, s. 205, og "Om staters suverænitet" Tidsskrift for Rettsvitenskab 1996, s. 603ff. og 612ff.

[42] Tó er tað so, at tað ikki er óvanligt fyri ES-rættarløgfrøðingar at pástanda, at ES ikki er eitt ríkissamveldi *(statsforbund)* av ríkjum við fullveldi, men meira er eitt samveldisríki *(forbundsstat)*. Sí t.d. Joseph Weiler, "The Transformation of Europe" í Yale Law Journal 1991, s. 2413. Sí tó kritisku viðmerkingarnar frá Spiermann í ávísingini omanfyri.

[43] James 1986 umrøðir omantjóða fyribrigdið á s. 245-254.

Fullveldi sum politisk sjálvstøða

Omanfyri er fullveldi viðgjørt í ymsum løgfrøðiligum merkingum. Hetta má tó ikki fáa okkum at gloyma, at sjálvstøða ella fullveldi í politiskum og búskaparligum høpi ofta hevur ein kanska meira tilvildarligan, men eisini ein heldur breiðari týdning enn tann reint løgfrøðiliga.

Eitt gott dømi um hetta er fyrrnevnda mál um tollsamgonguna millum Týskland og Eysturríki. Klassiska lýsingin av sjálvstøðu frá dómaranum Anzilotti var ein reint løgfrøðilig lýsing. Hetta forðaði tó ikki sama Anzilotti í at vera millum teir tilsamans átta dómararnar, sum ímóti sjey hildu, at tollsamgongan var í stríð við nevndu sáttmálar (ella annan teirra) og tískil ein hóttan móti eysturrískari sjálvstøðu sum skilt í hesum sáttmálum. Ósammælandi (dissentierandi) dómararnir skiltu sjálvstøðu og fullveldi á ein reint formligan hátt, soleiðis sum hetta hugtak vanliga hevur verið lýst í ríkis-og altjóðarættarligum bókmentum. Meirilutin tók hinvegin støðið í, at ásetingarnar um fullveldið/sjálvstøðuna hjá Eysturríki vóru skrivaðar av politikarum, sum eftir fyrra veraldarbardaga óttaðust fyri europeisku framtíðini. Hesir politikarar høvdu neyvan eitt smalt og formligt fullveldi fyri eyga, tá sáttmálarnir vórðu greiddir úr hondum. Meirilutin av dómarunum sóu seg tí noyddar at tulka fullveldi/sjálvstøðu í nevndu ásetingum øðrvísi og breiðari enn støðan hevði verið, høvdu politikararnir havt eitt vanlig løgfrøðiligt hugtak fyri eyga.[44]

Eitt annað dømi um munin millum eina politiska og løgfrøðiliga fatan av sjálvstøðu/fullveldi er kongssamveldið millum Danmark og Noreg 1380-1814. Upprunaliga bygdi hetta kongssamveldi á fulla sjálvstøðu og javnstøðu millum londini. Men í longdini varð Noreg við undirlutan, politiskt, búskaparliga og mentunarliga. Noreg bleiv stýrt úr Keypmannahavn, har kongur hevði sítt sæti. Henda stýring fór í praksis fram gjøgnum danskar embætismenn, sum í stóran mun ráddu fyri borgum í Noregi. Kjak hevur verið um, hvørja rættarliga støðu Noreg hevði sum tað veikara landið í hesum felagsskapi. Hóast ymsar fatanir, so hevur vanliga læran í norskum ríkisrætti verið, at Noreg altíð rættarliga varveitti støðuna sum sjálvstøðugt ríki.[45] Hetta kann vera løgfrøðiligi veruleikin, men fáur man ivast í, at Noreg politiskt var undir so sterkari ávirkan av Danmark, at tað ikki rættiliga gav meining politiskt at tosa um Noreg sum sjálvstøðugt ríki.

[44] Um dómin Spiermann 1999, s. 413-416.

[45] Soleiðis eisini Johs. Andenæs, "Statsforfatningen i Norge" 8 utg. 1998, s. 34.

Hesin munurin millum eitt løgfrøðiligt og eitt politiskt fullveldi, sum dómurin og dømið um Noreg lýsa, er framvegis líka aktuellur.[46] Støðan er nevniliga, at tað er rættiliga vanligt at politikarar nýta fullveldi/sjálvstøðu í eini breiðari merking enn teirri løgfrøðiligu. Orsøkin er kanska hon, at løgfrøðin ikki setir stórvegis krøv til veruliga (faktiska) innihaldið í fullveldinum/sjálvstøðuni útyvir tað reint formliga. James Crawford gevur við støði í altjóða praksis um varðlond eitt alment orðað boð uppá, hvat altjóðarættur krevur av veruligum innihaldi afturat tí formliga:

As a general rule it may be said that the exercise of delegated powers..... is not inconsistent with statehood if the derogations from independence are based on local consent, do not involve extensive powers of internal control, and do not leave the local entity without some degree of influence over the exercise of its foreign affairs.[47]

Sum skilst av hesum skal lítið til løgfrøðiliga fyri at ein politisk eind kann meta seg at hava fullveldi og sjálvstøðu.

Spurningurin er kortini, um tað er heppið at nýta orðið fullveldi um politiska sjálvstøðu. Í heiminum er fjøld av ríkjum, sum eru ógvuliga ymisk til støddar og í styrki. Hartil er styrkin hjá ríkjunum ikki einvís, tí ymisk ríki hava ymisk viðurskifti við hvørt annað innanfyri ólík lívsøki. Skal politisk sjálvstøða t.d. metast frá einum hernaðarligum, búskaparligum ella kanska mentunarligum sjónarmiði? Politisk sjálvstøða er eitt ógvuliga óítøkiligt fullveldishugtak. Í so máta minnir tað um tey fyrrnevndu løgfrøðiligu hugtøkini, fullveldi sum løgdømis frælsi og fullveldi sum rættarligt frælsi. Tey eru øll relativ og kvantitativ hugtøk, ið eru ov óneyv og margtýdd til, sum ríkisrættarlig sjálvstøða, at vera nýtiligur mátistøkkur fyri, hvørjar politiskar eindir hava - ella kunnu hava - ein sjálvstøðugan leiklut í altjóða samfelagnum og hvørjar ikki.[48]

Fullveldi nýtt politiskt

Eitt er at ymsar merkingar av fullveldinum av líkasælu ella vantandi vitan ikki verða hildnar hvør sær. Verri er tað ikki so sjáldsama fyribrigdi, at ymsar merkingar við vilja verða bendar og fløktar av politikarum og øðrum sum liður í politiskari agitatión.

---

[46] Sí K.W.B. Middleton "Sovereignty in Theory and Pratice" s. 150, í Stankiewicz 1969.

[47] Crawford 1979, s. 189.

[48] Eisini James 1986, s. 166-167 og 188-193.

Í undanfarna parti var komið inn á, at eitt reint løgfrøðiligt fullveldishugtak er meira smalt enn tað politikarar og onnur ofta skilja við fullveldi og sjálvstøðu. Men líka so skeivt tað er ikki at skilja millum formliga fullveldishugtakið og veruliga innihaldið í tí, eins skeivt er tað at siga fullveldishugtakið í sær sjálvum bert vera eitt formligt fyribrigdi. Í føroyska fullveldiskjakinum kemur tað týðiliga til sjóndar, hvussu fullveldishugtakið verður nýtt politiskt. Mótstøðufólk av fullveldisætlanini siga fullveldi bert vera tóma formalismu, meðan fullveldisfólk siga, at tað er í fullveldinum, at okkara atgongumerki til eina betri framtíð sum tjóð liggur. Báðir partar eru eitt sindur við síðuna av. Fullveldi er ongin trygd í sær sjálvum fyri eini betri framtíð fyri føroysku tjóðina. Men hinvegin er fullveldi ein ófrávíkilig fyritreyt, um Føroyar vilja verða ein sjálvstøðugur leikari á altjóða pallinum. Fullveldi má tí sigast at vera neyðugt, um eitt fólk vil menna seg sum sjálvstøðug tjóð, men nóg mikið er tað neyvan.[49]

Framferðin hjá fyrrverandi danska uttanríkismálaráðharranum, Niels Helveg Petersen, er eitt meira ítøkuligt dømi um politiska missnýtslu av fullveldishugtakinum. Tá Niels Helveg Petersen var í Føroyum í oktober 1998 kom hann í samrøðu við Sosialin inn á føroyska fullveldismálið og segði sambært Sosialinum millum annað hetta:

"Eg havi ein trupuleika við orðinum suverenitetur. Eg havi ilt við at skilja, hvat hetta orðið merkir. Tað verður sagt, at Danmark er ein suverenur statur, men Danmark hevur pliktað seg til hópin av altjóða avtalum eitt nú í samband við ST, NATO og ES, sum gera, at suverenitetur er eitt hugtak sum ikki longur gevur nakra meining".[50]

Í maj mánaði ár 2000 segði ES-nevndarformaðurin Romani Prodi á eini Danmarkarvitjan, at Danmark ikki kundi melda seg út aftur, hevði tað fyrst avgjørt at fara uppí samstarvið um evruna. Hetta hevði við sær, at fleiri danir afturvístu Prodi. Ein av hesum dønum var Poul Nyrup Rasmussen. Í Berlingske Tidende varð hann endurgivin fyri at hava sagt hetta:

"Lige så klart som at Grønland kunne træde ud af EF-samarbejdet for nogle år tilbage, lige så klart er det, at Danmark som en suveræn stat kan træde ud"[51]

[49] Sí James 1986, s. 270 og 276.
[50] Sosialurin 29. Oktober 1998.
[51] Berlingske Tidende 15 maj. 2000.

Nyrup hevur sjálvandi rætt í, at Danmark sum eitt fullveldisland reint løgfrøðiliga (ríkisrættarliga) til eina og hvørja tíð kann melda seg út. Tað er tó ikki so áhugavert í hesum sambandi. Tað áhugaverda er, at Niels Helveg Petersen sum umboð fyri donsku stjórnina fyri føroyingum sigur tað øvugta. Hann metir ikki, at tað gevur meining at tosa um hugtakið fullveldi. Hetta byggir hann á, at lond í dag hava pligtað seg við so nógvum avtalum við m.a. ES og ST, at tey ikki longur skulu hava fullveldi. Hann vísir sostatt á avmarkingarnar hjá Danmark í tí serstaka rættinum at ráða og vil við hesum gera fullveldi óaktuelt og harvið eisini føroysku ætlanirnar óviðkomandi og óaktuellar. Yvirfyri føroyingum er fullveldi eitt kvantitativt hugtak sum t.d. rættarligt frælsi. Hinvegin tryggjar stjórnarleiðari hansara, Nyrup, donsku veljarunum danskt sjálvræði við at vísa á tann almenna rættin at ráða. Nú er fullveldi yvirfyri donsku veljarunum eitt kvalitativt fyribrigdi, sum ger, at Danmark hóast alt situr við endaliga valdinum.

Hetta er eitt gott dømi um, hvussu fullveldi verður bent ávísar vegir alt eftir hvørja politiska støðu ein vil styrkja. Tað skal tó gerast vart við, at hetta ítøkiliga dømi onki serligt hevur við danskar politikarar at gera. Hetta er bert eitt av nógvum dømum um, hvussu fullveldishugtakið verður missnýtt av politikarum.

Sum nomið við seinni, er tað neyvan rætt, tá Niels Helveg Petersen fær tað at ljóða so, at fullveldi ikki longur hevur stóran týdning. Men hóast fullveldi nú veruliga var viknað sum virði í altjóðarætti og altjóða politikki, so gevur tað ikki rættiliga meining, sum Niels Helveg Petersen og fleiri við honum, at brúka hetta sum amboð móti føroysku fullveldisætlanini. Teir føroyingar, ið stuðla fullveldisætlanini hugsa ikki um, hvørt fullveldi er sterkt, so ríkini standa sterk móti altjóðarætti og altjóða samfelagnum (hinum ríkjunum), ella um tað er veikari, so ríkini í størri mun mugu akta altjóðarætt og altjóða samfelagið. Ætlanin við fullveldisætlanini, hvørt einum dámar hana ella ikki, er, at Føroyar skulu verða síðusettar hinum viðspælarunum (aktørunum) í altjóða samfelagnum. Um slíkur sjálvstøðugur leiklutur í altjóða samfelagnum merkir eitt slag av alvaldi ella eitt vald, sum helst er veikari er rættiliga óviðkomandi fyri fullveldisætlanina. Føroyar mugu undir øllum umstøðum taka við teimum treytum, heimurin gevur.

Fullveldi sum grundarsteinur í altjóða samfelagnum

Alan James kallaði bók sína um ríkis-og fullveldishugtakið fyri "Sovereign Statehood -The Basis of International Society". Sum heitið á hesi bók sigur, eru tað ríkini við fullveldi og sjálvstøðu, sum eru grundarsteinarnir í altjóða samfelagnum. Hetta er heilt grundleggjandi og kemur eisini til sjóndar á

tann hátt, at ríkini verða kallaði tey upprunaligu (origineru) rættarsubjektini í altjóðarætti, meðan øll onnur altjóðarættarsubjekt verða nevnd avleidd rættarsubjekt. Tey eru stovnað av ríkjum og hava sína keldu har. Í hesum sambandi er eisini vert at leggja til merkis, at skipanin við ríkjunum sum grundvølli í altjóða samfelagnum hevur verið støðug í fleiri hundrað ár. Hálv fjórða øld er gingin síðan friðin í Westfahlen eftir 30-ára kríggið, tá henda skipan alment bleiv útrópt. Men í veruleikanum gongur hon enn longur aftur.

Gjøgnum miðøldina var tankin um sjálvstøðug ríki ikki sambæriligur við ráðandi samfelagshugsan. Pávin og keisarin kravdu valdið og vórðu hildnir at hava rætt til hetta vald, sum teir í veruleikanum eisini í stóran mun høvdu í kristna heiminum. Longu um ár 1300 gjørdust tað tó sjónligt, at ráðandi politisku eindirnar í Vestureuropa fóru at verða ríkini við fullveldi og sjálvstøðu. Næstu 200 árini ella so bleiv henda skipan so at siga fullførd. Síðan tá eru broytingar hendar í smálutunum, men grundleggjandi kann vera tosað um framhald (kontinuitet) frá 16. øld fram til 21. øld. Sagt øðrvísi, so hevur grundarlagið í altjóða samfelagnum eina søgu, ið gongur heilt aftur til upploysnina av miðaldarskipanini.[52]

Tá nú tosað verður um altjóða samfelagið má havast í huga, at talan bert er um samløguna (summin) av ríkjunum. Altjóða samfelagið er onki í sær sjálvum. Tað hevur onki lóggávuvald og ongan vilja, sum í seinasta enda kann gerast galdandi móti ríkjunum

Virðini í altjóða skipanini, sum tey eisini hava víst seg í altjóðarætti, hava verið virðini frá liberalu individualismuni flutt á millumtjóða støði. Skipanin hevur ikki vilja vitað av valdi, ið hevur havt gildi ímóti ríkisviljanum. Altjóðarættur hevur verið skipaður so, at hvørt ríki hevur kunnað framt tað, sum tað nú einaferð hevur hildið verið gott. Altjóða skipanin hevur soleiðis ikki virkað út frá eini hugsjón um felags virðir.[53] Henda klassiska heimsmyndin er sjálvandi broytt eitt sindur, m.a. í sambandi við tann altjóðarætt, ið er komin burturúr mannarættindarørsluni. Men spurningurin er, hvussu grundleggjandi broyting talan er um.

Í gjøgnum 20. øld bleiv tað eisini alt meira vanligt at leypa á fullveldið og siga, at fullveldi sum virði í altjóðarætti og altjóða politikki hevði mist sín

[52] Sí James 1986, s. 30.

[53] Sí Martti Koskenniemi, "The Future of Statehood" í Harvard International Law Journal, 1991 (Koskenniemi 1991) s. 404.

týdning. Kritikkurin kann grovliga býtast í tveir partar. Ein moralskan og ein empiriskan.

Moralski kritikkurin hevur m.a. snúð seg um, at skipanin við ríkjum við fullveldi er óheppin, tí hon er so væl er egnað til at styrkja sjálvgóðskuna hjá tjóðum, sum hevur verið orsøk til so nógva líðing gjøgnum søguna.[54] Hartil verður ofta ført fram, at skipanin við fullveldisríkjum ikki er fremjandi fyri mannarættindini. Tað kann vera nógv skilagott í slíkum sjónarmiðum, men fólk tykjast eisini at gloyma, at so leingi veruleikin er tann, at nógvar tjóðir eru í heiminum, sum framvegis hava grundleggjandi ymisk virðir, so ber tað neyvan til at skipa heimin nógv øðrvísi.[55]

Harafturímóti fær ein lættari havt eina meining um empiriska kritikkin. Her er støðan ikki bert, at fullveldi er av tí ringa, men eisini, at fullveldi er eitt hugtak á veg út. Hetta skuldi so á onkran hátt verið møguligt at sæð við at eygleiða støðuna í heiminum, sum hon er í dag.[56]

Frá politiskari síðu verður ofta ført fram, at heimurin, væl hjálptur á veg við m.a. nýggjari tøknifrøði, í dag er so samantvinnaður *(interdependent)*, at fullveldi sum grundarlag undir heiminum ikki longur er so veruligt. Ivaleyst er tað eisini satt, at ríki í dag hava verri við at liva einsamøll og sigla egnan sjógv enn nakrantíð fyrr. Men ríkishugtakið og fullveldishugtakið eru enn ikki býtt um við nakað alternativ. Ofta verður eisini tosað um økis (regionala) integratión, serliga hana í Vestureuropa, sum tekin um, at ríkini eru um at hvørva. Men skuldi tað hent, sum enn ikki er veruleiki, at ES verður eitt risaríki, so er hetta ikki ein hóttan móti ríkishugtakinum. Talan hevði bert verið um eitt nýtt ríki í Europa. Eisini kann verða víst á, at tjóðirnar í Vestureuropa, sum í nógvar mátar eru saman um mentan, trúgv og onnur virðir, kortini hava so ymisk áhugamál, at integratiónin møtir álvarsligari mótstøðu. Tá so er kann vera ringt at ímynda sær, hvussu tíðin kann vera farin frá ríkjunum í pørtum av heiminum, har áhugamálini ganga nógv meira ímóti hvørjum øðrum enn í (Vestur) Europa.

---

[54] Sí t.d. Alf Ross, "Lærebog i folkeret" 6 udg. s. 52.

[55] Soleiðis eisini Koskenniemi 1991, s. 403.

[56] Ein kendur krittikari leyp á frá báðum síðum, tá hann segði, *"it would be of lasting benefit to political science if the whole concept of sovereignty were surrendered"*. Hetta tí at, *"it is at least probable that it has dangerous moral consequences"* og *"is of dubious correctness in fact"*. Harold Laski í "The Grammar of Politics", 1941. Her tikið eftir F. H. Hinsley, "Sovereignty" 2 útg. Cambrigde 1986, s. 216.

Tá tosað verður um integratión, má eisini verða mint á, at øvugta fyribrigdið eisini er virkið. Soleiðis er talið av ríkjum økt munandi síðan sjálvsavgerðarrætturin mentist og gjørdust virkin eftir seinna heimsbarbaga. Og í seinastuni hevur heimurin aftur sæð fleiri nýggj ríki føðast sum avleiðing av, at størri ríki eru syndraði eftir endan á kalda krígnum.

At samanspælið er intensivari enn fyrr og inspiratiónin um landamørk størri enn nakrantíð sigur tó onki í sær sjálvum. Tað er sum við eini familju, ið hevur sterkt samanhald ímóti einari, har einstaklingarnir hava lítið við hvønn annan at gera. Í familjuni við tí sterka samanhaldinum eru persónarnir framvegis líka nógv serstøk menniskju við sjálvstøðugum samleika, sum persónarnir í familjuni við tí leysara sambandinum. Somuleiðis við altjóða samfelagnum. At ymsir partar av heiminum nú viðkoma hvørjum øðrum meira enn fyrr broytir ikki tann grundleggjandi bygnaðin.[57]

Ein kann eisini spyrja um ikki áhaldandi álopini á fullveldið og spádómarnir um, at dagarnir hjá fullveldisríkjunum eru um at vera taldir ikki júst eru prógv um tað øvugta. Er talan ikki um, at fullveldi framvegis er eitt so grundleggjandi virði í altjóða samfelagnum, at tað framvegis kann øsa tey, ið hava hugsjónir um ein annan heim?[58]

Heimurin er kanska meira samantvinnaður enn fyrr, men fullveldi er framvegis grundarsteinur í altjóða samfelagnum og fer ivaleyst at verða tað í eina langa framtíð.[59]

Tað kundi verið hóskandi at enda hesa grein um fullveldishugtakið við orðunum hjá Ian Brownlie, einum av fremstu núlivandi altjóðarættarløgfrøðingunum, har hann sigur, hvat hann heldur um henda mótan at burturvísa fullveldið:

"Seeking signs of the "rebirth of statehood" is more than a little premature: there is no evidence that the state has died. It is an intellectual fashion to preach the end of the State and to attack sovereignty. But such iconoclasm has no impact on the real world."[60]

[57] James 1986, s. 192.
[58] Sí W. J. Stankiewicz "A Critique and an Interpretation" s. 3-4, í Stankiewicz 1969.
[59] Koskenniemi 1991, s. 407.
[60] Ian Brownlie endurgivin í Spiermann 1999, s. 22-23.

Ulla Svarrer Wang*

Who'll get the Rockall Plateau?

- An analysis of the claims to the continental shelf in the North East Atlantic by the United Kingdom, Ireland, the Faroe Islands-Denmark, and Iceland.

English Summary
In the North East Atlantic the United Kingdom, Ireland, the Faroe Islands-Denmark, and Iceland have competing claims to the continental shelf on the

---

* MSc Engineering (Aalborg), LL.M. International Law (Napier University, Edinburgh).

Rockall Plateau. In 1974 the UK and Ireland made their first continental shelf designations on the Rockall Plateau west of the Scottish and Irish coasts, and have subsequently designated additional continental shelf areas extending to the western edge of the Rockall Plateau. These two States agreed in 1988 on their continental shelf delimitation in this area. Faroe-Denmark and Iceland designated their continental shelves in 1985, and their claims extend also to the Rockall Plateau and overlap with the UK's and Irish claims. There are now two main areas on the Rockall Plateau where there is a dispute on the rights to the continental shelf between (i) the UK, Faroe-Denmark, and Iceland and (ii) Ireland, Faroe-Denmark, and Iceland.

The dispute on the Rockall Plateau is a consequence of continental shelf claims extending beyond 200 nautical miles from the baselines of the four parties territorial sea. The claims are based on a natural prolongation of the coastal States land territory to the outer edge of the continental margin, as provided in Article 76 of the 1982 United Nations Convention on the Law of the Sea (UNCLOS).

The four parties could possibly agree on the delimitation of the continental shelf. However, continental shelf delimitations have caused much litigation, and probably this dispute would also be submitted to the International Court of Justice or a Tribunal. This would require the parties to present geological evidence for the natural prolongation of their continental shelves extending beyond 200 nautical miles. The Commission on the Limits of the Continental Shelf established by UNCLOS shall also make recommendations to coastal States on continental shelf claims beyond 200 nautical miles. If none of the parties' claims were accepted, the area on the Rockall Plateau would be beyond the limits of national jurisdiction and declared deep sea-bed. The area and its resources would be the common heritage of mankind and fall to the International Sea-Bed Authority.

Introduction

Four States have laid claims to the continental shelf in the North East Atlantic in the area west of the British Isles on the Rockall Plateau. These are: the United Kingdom, Ireland, the Faroe Islands-Denmark, and Iceland.

The first continental shelf designations on the Rockall Plateau were made in 1974 by the UK and Ireland. After these States had claimed continental shelf in the area, Faroe-Denmark and Iceland made designations in 1985. This resulted in overlapping claims on the Rockall Plateau. In 1988 the UK and Ireland signed an agreement on the delimitation of the continental shelf in

this area, which divided the plateau between the two States. However, Faroe-Denmark and Iceland protested against this agreement, and there are still two main areas of dispute between (i) the UK, Faroe-Denmark, and Iceland and (ii) Ireland, Faroe-Denmark, and Iceland.

In 1985 when Faroe-Denmark and Iceland made their continental shelf designations the four parties had consultations on the dispute. Since then there has been no formal contact between the parties on this matter.

Whether the dispute resolution will be by negotiations to enter into a delimitation agreement or by litigation is uncertain. To achieve an agreement each party will have to give up a considerable part of its claims. If judicial settlement is chosen the parties will have difficulty predicting a possible outcome of a court or tribunal decision.

The Faroe Islands are situated in the North Atlantic, northwest of Scotland, about midway between the Shetland Islands and Iceland. The Faroe Islands are a self-governing part of the Kingdom of Denmark. The subsoil resources were following lengthy negotiations transferred to Faroese Authorities in 1992.

If the Faroe Islands become fully independent, agreements entered into by Denmark and the Faroe Islands on the one hand and third parties on the other hand, concerning delimitation of the continental shelf would bind the Faroe Islands.

Danish Sovereignty over the continental shelf extending from the Danish coastlines is proclaimed in Royal Decree No. 259 of 7 June 1963, and it comprises also the Faroese continental shelf. The boundary of the continental shelf between the Faroe Islands and Norway within 200 nautical miles was determined in a treaty concluded between Faroe-Denmark and Norway in 1979. Faroe-Denmark and the UK signed an agreement in 1999 on maritime delimitation in the area between the Faroe Islands and the UK. The parties agreed on the continental shelf boundary and fishery boundary within 200 nautical miles from the baselines from which the territorial sea of each Party is measured. The agreement is without prejudice to any claim of either of the Parties beyond 200 nautical miles, by implication the overlapping claims of Faroe-Denmark and the UK on the Rockall Plateau.

The continental shelf and fishery boundary in the area between the Faroe Islands and Iceland is not established. There is a disagreement between the

parties concerning the Icelandic offshore rock, Hvalbakur, which Faroe-Denmark does not recognise as a basepoint, while Iceland has applied the rock as a basepoint in its continental shelf designation.

Rockall is a small skerry situated about 200 nautical miles west of the Hebrides and was annexed by the British Crown in 1955. There has been a dispute between the UK and Ireland, Faroe-Denmark, and Iceland on UK's fishing zone reckoned from Rockall, and whether Rockall could generate continental shelf areas claimed by the UK. UNCLOS entered into force in 1994, and Article 121(3) of the Convention provides that uninhabitable rocks have no exclusive economic zone or continental shelf. The UK acceded to UNCLOS in 1997 and recognised that Rockall, as an uninhabitable rock, does not generate continental shelf or fishing zones.

The disputed area on the Rockall Plateau is on overlapping claims to the continental shelf extending beyond 200 nautical miles from the coasts of the four parties. The continental shelf extends throughout the natural prolongation of a States land territory to the outer edge of the continental margin (Article 76(1) of UNCLOS). The Commission on the Limits on the Continental Shelf was established in 1997 and has in 1999 adopted Guidelines aimed at assisting coastal States in establishing the outer limits of their continental shelf, where those limits extend beyond 200 nautical miles. The Commissions recommendations will be significant in evaluating the parties' continental shelf claims on the Rockall Plateau.

Continental Shelf Boundary Agreements

Faroe-Denmark – Norway
Faroe-Denmark and Norway agreed on the delimitation of the continental shelf and fishery zones between the Faroe Islands and Norway within 200 nautical miles in an agreement of 15 June 1979, and the boundary is the median line. Similarly, the UK and Norway agreed on a continental shelf boundary on 22 December 1978 where the boundary is an equidistant line. The UK – Norway agreement extends to the point that is equidistant from the nearest points of the baselines from which the territorial sea of the UK, Norway and Faroe Islands is measured.[1] The Faroe-Denmark – Norway

[1] Symmons, C.R., British Off-Shore Continental Shelf and Fishery Limit Boundaries: An Analysis of Overlapping Zones, (1979) 28 *International and Comparative Law Quarterly (ICLQ)*, pp. 703-33, at p. 705. For other sources on Continental Shelf delimitation see, *inter alia*, Evans, M.D., Maritime Delimitation and Expanding Categories of Relevant Circumstances, (1991) 40 *ICLQ*, pp. 1-33;

agreement extends from this equidistant tripoint north to the point, which is 200 nautical miles from both Faroe and Norway.[2] It seems like the parties in 1979 accepted that the continental shelf always extends to a distance of 200 nautical miles from the baselines from which the breadth of the territorial sea is measured, as articulated in Article 76 of UNCLOS. Even if the negotiations at UNCLOS III were still ongoing in 1979, this principle had become part of state practice. Neither of the parties has so far designated continental shelf areas beyond 200 nautical miles in the area north of Faroe. The reason for this is probably that this area is deep seabed and that the continental shelves of the states do not extend into this area.

Denmark, Norway and the UK were all parties to the 1958 Continental Shelf Convention when the agreements on delimitation of the continental shelf were negotiated. It does not appear from the literature, whether there was disagreement at any time between the parties as to where the boundary should be fixed, but as can be seen, all parties used the principle of equidistance in their agreements, as provided in Article 6 of this Convention.

Faroe-Denmark – Iceland

In the area west of the Faroe Islands, between the Faroe Islands and Iceland, the Faroese/Danish designation of continental shelf is a series of steps. The principle of median lines is used by Iceland, which has declared an exclusive economic zone and has designated the continental shelf. However, there is a dispute between the parties concerning the Icelandic rock Hvalbakur that lies 20 miles from Iceland. Faroe-Denmark does not recognise this rock as a basepoint, while Iceland considers the median line towards the Faroe Islands, reckoned from Hvalbakur, to be the boundary of its continental shelf. Faroe-Denmark have also used the median line when declaring the Faroese fishing zone, but have not taken Hvalbakur into consideration, and hence there is an area where the fishing zones of the parties overlap. The Faroese/Danish view is that the offshore rock Hvalbakur has the same status as Rockall, namely a rock that cannot sustain

Harris, D.J., Cases and Materials on International Law, 5th Edition, Sweet & Maxwell, London, 1998, at pp. 455-6; Highet, K., The Use of Geophysical Factors in the Delimitation of Maritime Boundaries. *In* Charney, J.I. and Alexander, L.M. (eds.), *International Maritime Boundaries*, 1993, pp. 163-202.

[2] *Report of the Faroese Hydrocarbon Planning Commission to the Faroese Government*, Tórshavn, Faroe Islands, 1993, at p. 51

human habitation and consequently does not generate an exclusive economic zone or continental shelf (Article 121(3) of UNCLOS).[3]

Faroe-Denmark – UK
The agreement on maritime delimitation between Faroe-Denmark and the UK of 18 May 1999 seems also to be based on the equidistance principle, and both States are parties to the 1958 Continental Shelf Convention. The negotiations on this agreement took place over more than 20 years. The parties had first declared their respective fishing zones, and although the parties agreed upon that the boundary should be the median line, they disagreed on how this equidistance line should be fixed. The UK used its outermost rocks and islets as basepoints and did not recognise the straight Faroese baselines. Faroe-Denmark did not recognise the small British rocks and islets, as Rockall, Sule Skerry, Sula Sgeir, North Rona, and Flannan Isles. Faroe-Denmark and the UK had designated their continental shelf areas and within 200 nautical miles the parties delineated the designation by step-lines so there was no overlap of designated areas.[4]

